

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 05 - 2012

# Heimsins størsta oljufelag partur av Føroya Oljuídnaðarbólki

Í morgun varð heimsins størsta oljufelag, tað amerikanska ExxonMobil, tikið upp sum limur í FOÍB, Føroya Oljuídnaðarbólkur. Hetta hendi á fundi í Keypmannahavn, har tey sjey limafeløgini í FOÍB luttóku. Limafeløgini eru umframt ExxonMobil, Statoil, Dong, OMV, Valiant, Faroe Petroleum og Atlantic Petroleum. ExxonMobil keypti seg inn í tvey av leitiloyvunum hjá Statoil í Føroyum í fjør og er við í boringini í summar saman við Statoil og Atlantic Petroleum. Við hesum oljurisanum er oljuleitingin í Føroyum av álvara komin aftur á altjóða oljukortið FOÍB, sum er áhugafelagið hjá umrøddu oljufeløgum, ið hava leitiloyvi og forkanningarloyvi á føroyska landgrunninum, er hetta seinasta árið vorðið alt meira sjónligt og virkið í føroyska samfelagnum. Felagið roynir at byggja brýr millum altjóða oljufeløg og føroyskar myndugleikar, vinnulívið og almenningin. Eisini hevur felagið seinastu 10 mánaðirnar staðið fyri einum føroyskum oljuportali, sum hvønn dag kunnar føroyingar um oljuvirksemi í Føroyum og útlandinum. Mynd - Frá fundinum hjá FOÍB í Keypmannahavn í morgun. Umboð fyri tey sjey oljufeløgini, sum eru limir í FOÍB her saman við stjóranum í FOÍB. Myndatøka oljan.fo.